Maid in Manhattan – Byens små mirakler

Aftur ein av gentufilmunum. Ein Øskufíu-filmur, sum hevur alt, ein øskufíufilmur skal hava. Lat tað beinanvegin verða sagt, at ert tú ein, sum leitar eftir stórspæli og møguligum Oscar-vinnarum, so er Maid in Manhattan ikki fyri teg. Ert tú hinvegin úti eftir at síggja ein fittan og romantiskan film saman við vinkonunum ella sjeikinum, so er filmurin júst tað, tú/tit hava brúk fyri.

Jennifer Lopez hevur høvuðsleiklutin í filminum. Hon er stovugentan, Marisa Ventura á Beresford hotellinum í Manhattan. Pengar eru ikki nógvir av, og eisini hevur Marisa ein son, sum eitur Ty. Páp-an sær hann ikki nógv til, og er pápin ein av teimum, sum altíð hevur ein umskyldning fyri ikki at koma – aftur hesuferð.

Lívið er strævið, og hvønn dag noyðist Marisa til arbeiðis fyri at fáa breyð á borðið hjá familjuni. Men hon trívist væl á hotellinum millum hinar stovugenturnar, og eisini hini arbeiðsfólkini á hotellinum eru góð við hana og sonin.

Ein dagin, tá Marisa og ein stovugenta og vinkona, Steph, gera reint í Park-suituni, fjasa tær býtt, og endin verður tann, at Steph fær yvirtalað Marisu til at royna eina 5000$ verda Dolce & Gabbana drakt. Tingini byrja at ganga galið, og beint tá kemur senator-valevnið Chris Marshall inn við soninum Ty, tí Ty vil við Chris at ganga túr við hundinum Rufus. Nú eru góð ráð dýr. Ikki er nógv annað at gera enn at lata sum um Marisa býr á kamarinum, og tá Chris bjóðar henni við út ber ikki til at bera seg undan.

Nú er bara at gera alt fyri, at Chris ikki finnur útav, at Marisa ikki er ein rík kvinna við einum góðum arbeiði, sum gevur nógvar pengar. Hon roynir av øllum alvi at krógva tað, men tað er lættari sagt enn gjørt.

Endin av filminum skal ikki avdúkast her, men hetta er sum sagt ein Øskufíu-filmur, so endin er nú ikki so torførur at rokna út.

Filmurin er ok. Hann er stuttligur í støðum, og tann mest sjarmerandi í øllum filminum er sonurin, Ty. Hygg bara eftir honum. Tú fert ikki at biðja um pengarnar aftur aftaná.

Fakta um <Maid in Manhattan>

leikarar:	Jennifer Lopez, Ralph Fiennes, Tyler Posey, Marissa Matrone, Natasha Richardson
longd:	107 min.
stað:	Havnar Bio – filmurin er fyri øll

Jákup Mørk, ítróttarskrivari á Sosialinum:

1. Heldur tú sjálvur, at tú ert húsligur?
– Nei, ikki serliga. Eg vaski gólv av og á og okkurt annað smávegis. Men mær dámar ikki at rudda, men væl at gera mat.

2. Hvat fyri uppvaskisápu nýta tit heima?
– Kemilux sitrónuppvask, og onnur uppvaskibustin er hvít, og hin er reyð.

3. Hvussu ofta gert tú døgurða um vikuna?
– Tað er ymiskt. Alt eftir nær eg eri heima, men mær dámar væl at gera mat. Tað er bara ikki so ofta, at tíð er til tað.

4. Hvussu longi kókar tú eplir?
– 35 minuttir, men tað veldst sjálvandi um tey eru stór ella lítil. Tey størru fáa eitt sindur longri tíð.

5. Og egg?
– Tá eg kóki egg, vil eg hava tey hartkókað, so tey fáa ríkiligt. Men annars dámar mær best spejlegg, og tá skal blomman vera bleyt.

6. Hvørja húsarhaldsplikt dámar tær minst at gera?
– At rudda upp inni í kamarinum, so tað geri eg ongantíð.

7. Og hvørja dámar tær so best?
– Um matgerð er ein húsarhaldsplikt, so dámar mær best hana. Og annars at skrúva tónleik hart frá og so fara at vaska gólv. Tað allarbesta er tó, tá ein nýtir einar 5-6 tímar at gera ein góðan døgurða.

8. Hvørjum borðreiðir tú við, tá tú hevur gjørt okkurt serstakliga leskiligt?
– Tá gevi eg tí allan armin. Kanska ein fiskaforrætt ella rækjur. Onkra lekra steik ella villinidjór til høvuðsrætt og so onkra lekra dessert omaná. Og hon er ongantíð tann sama.

B rm lt upp 5-6 t mar

ítróttur

Nr. 81 • mikudagur • 30. apríl 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Jacques undirskrivað sáttmála við ÍF Føroyar

Leygardagin 19. apríl skrivaðu TMS Jackways, ið er felagið aftanfyri føroyska náttklubban í Keypmannahavn, og ÍF Føroyar-Fótbólt undir stuðulssáttmál fyri kappingarárið 2003. Á myndini síggjast Todi Jónsson, partaeigari í TMS Jackways, og Uni L. Hansen, nevndarlimur í ÍF Føroyum.

TÍÐINDASKRIV

Á móttøku í sambandi við eitt ára føðingardagin hjá náttklubbanum Jackways leygardagin 19. apríl megnaði nevndin hjá føroyska fótbóltsfelagnum í Keypmannahavn, ÍF Føroyum, tað, sum FCK-leiðslan ikki dugdi: At fáa Tóda Jónsson at seta sína undirskrift á ein sáttmála.

Hetta merkir tó ikki, at Tódi Jónsson skal spæla við ÍF Føroyar komandi kappingarár, tí talan er ikki um ein leikarasáttmála, men hinvegin um ein stuðulssáttmála millum TMS Jackways, ið er felagið aftanfyri náttklubban, og sum Todi Jónsson er partaeigari í, og ÍF Føroyar-Fótbólt.

Sáttmálin inniber millum annað, at 1. og 2. lið hjá ÍF Føroyum í 2003 fer at brúka venjingartroyggjur við búmerkinum hjá Jacques Discothèque á. Um onkur undrast yvir, hví tað skal standa Jacques Discothèque og ikki Jackways á troyggjunum, er orsøkin, at føroyski náttklubbin hevur tikið navnabroyting og framyvir fer at ganga undir hesum franska heiti. Hetta hendi eisini í sambandi við eitt ára føðingardagin.

Stuðulssáttmálin millum TMS Jackways og fótbóltsdeildina hjá ÍF Føroyum er komin í lag eftir ynski frá báðum þartum, tí tað bleiv hildið, at tað var upplagt, at ÍF Føroyar-Fótbóltur og Jacques Discothèque samstarvaðu. Á ein hátt eru fótbóltsfelagið og náttklubbin í familju, tí talan er í roynd og veru um føroyskar stovnar á danskari jørð, hvørs leikarar og viðskiftafólk eru føroyskir útisetar í danska høvuðsstaðnum. Tað skal heldur ikki avnoktast, at í mongum førum er talan um somu persónar, ið ganga aftur á báðum støðum.

Stuðulssáttmálin er eitt munagott ískast til raksturin av ÍF Føroyar-Fótbólti, hvørs besta lið av trimum í løtuni er at finna í oddinum á dansku seriu 1.

Sáttmálin ger TMS Jackways til høvuðsstuðul hjá ÍF Føroyum-Fótbólti fyri kappingarárið 2003.

Flogbóltssambandið havt aðalfund

AÐALFUNDUR

Páll Holm Johannesen

Sunnudagin hevði Flogbóltssamband Føroya aðalfund. Undirtøkan var góð, tí øll feløgini luttøku, fyriuttan eitt. Størsta umrøðan fór við teimum yngru deildunum. Stóra undirtøkan millum tey ungu, ger at kappingarnar ikki kunnu skipast eftir núverandi leisti.

Umframt tey ungu, so varð kjakast um upp- og niðurflytingardystir skulu vera í framtíðini. Feløgini avráddu at innkalla til ein eykaaðalfund skjótast gjørligt, við tí fyri eyga at fremja eina lógarbroyting.

Nevndin í Flogbóltssambandinum varð øll afturvald. Í henni sita, Niclas Joensen, formaður, Magnus Tausen, skrivari og Trúgvi H. Poulsen, kappingarleiðari.

Svimjilandsliðið úttikið

Malan Michelsen og Andrass Thomsen vera fyri fyrstu ferð við á oyggjaleikunum

SVIMJING

Páll Holm Johannsen

Um vikuskiftið var úttøkukapping hjá svimjararunum til oyggjaleikirnar seinast í juni mánaði. Kappingin byrjaði fríggjadagin, og hildið varð á til sunnukvøldið. Tey luttakandi feløgini vóru, Ægir, Havnar Svimjifelag, Fuglafjarðar Svimjifelag og Tvøroyar Svimjifelag.

Eftir kappingarnar boðaði landsliðsvenjarin frá, Petur Heðin á Fløtti, hvørjir svimjarar fara at umboða Føroyar á oyggjaleikunum á Guernsy. Hesi eru: Dia Jacobsen, Andrass Thomsen, Eivind Eysturoy, Ásbjørn Hansen, Kristoffur Hentze, Benthe S. Andersen, Malan Michelsen, Shaila millum Garðarnar.

Komandi vikuskiftið møtast oyggjaleikasvimjararnir til fyrstu venjingarleguna, sum verður í Fuglafirði.

Frá vinstru aftast: Eivind Eysturoy, Kristoffer Hentze, Dia Jacobsen, Andrass Thomsen frá vinstru framman: Petur Heðin á Fløtti venjari, Benthe Sikivat Andersen, Malan Súsanna Michelsen, Shaila millum Garðarnar og Remi Lamhauge hjálparvenjari. Asbjørn Hansen vantar á myndini